

## Stuðul til ættleiðing hækkar

Nú eru góð tíðindi til teirra, ið ætla at ættleiða. 1. Januar 2009 verður stuðulin til ættleiðingar nevniiga hækkaður. Eitt samt løgting hevur gjørt av at hækka stuðulin úr 50.000 kr. til 75.000 kr. Síðani á sumri 2007, hevur nevndin í Ættleiðingarfelagnum arbeitt miðvíst fyri, at stuðulin til ættleiðing varð hækkaður. Nógv samskifti hevur verið við landsstýrisfólk og løgtingslimir og nú er komið á mál. Hetta vísir, at hóast politiska skipanin mangan man tykjast tung at fáast við, so kann bera á mál, um arbeitt verður miðvíst við tolni. Nevndin fegnast um, at stuðulin verður hækkaður og takkar øllum teimum, ið hava gjørt hetta møguligt, serliga løgtingslimum og landsstýrisfólkum.

# Gera nú klárt til Eysturoyartunnil

**Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, hevur nú fingið bæði pengar og grønt ljós frá samgonguni til at seta ferð á arbeiðið at gera undirsjóvartunnilin ímillum Streymoy og Eysturoy og hon ætlar sær ikki at leggjast á boðini**

UNDIRSJÓVARTUNNIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, fer nú at seta ferð á eina tilgongd at fáa Eysturoyartunnilin framdan í verki. Nú er nokk drálað, sigur hon. Hetta er strsta íløga í Føroyum nakrantíð*

Nú skal rættilig ferð setast á arbeiðið at gera nógv umrødda undirsjóvartunnilin ímillum Streymoy og Eysturoy.

Tað hava bæði samgongan og Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, sett sær fyri.

Annika Olsen sigur, at á landsstýrisfundi í farnu viku fekk hon grønt ljós frá landsstýrinum at taka upp samráðingar við privata felagið, sum tók stig til Eysturoyartunnilin um treytirnar, fyri at fáa loyvi at gera tunnilin.

Og nú fíggjarlógin fyri næsta ár er samtykt, hevur landsstýriskvinnan eisini tryggjað sær eina játtan upp á eina millión til uttanhýsis ráðgevara hjá innlendismálaráðnum í sambandi við at gera ein sáttmála við privata tunnilsfelagið um loyvistreytirnar.

**So skjótt sum gjørligt**

Annika Olsen sigur, at nú verður farið undir arbeiðið so skjótt sum gjørligt eftir nýggjár og í løtuni verður leita væl og virðiliga eftir einum skikkaðum, uttanhýsis ráðgevara og tað kann alt henda, at talan verður um ein útlending.

Tinglimir í andstøðuna ivast alvorliga í um tað er rætt at fara undir eina so stóra verkætlan, sum støðan í samfelagnum er í løtuni.

Men Annika Olsen kveistrar allan iva til viks.

- Vit hava rætt og slætt ikki ráð til at lata vera við at fara undir tunnilin og vit kunnu ikki loyva okkum at drála longri, staðfestir hon.

- Tað er eisini sera umráðandi at halda virksemið ígongd í tíðum sum hesum, leggur hon afturat.

Hon sigur, at samfelagsliga nyttan av hesum tunlinum, er at fyri hvønn tíma er samfelagsliga íkastið av tunlinum 15.000 krónur um tíman, 2,5 milliónir um vikuna, 10,8 milliónir um mánaðin og 130 milliónir krónur um árið.

Tað kenst av, at tað eru 2000 bilar, sum koyra 40 kilometrar ov langt og brúka 30 minuttir óneyðugt hvønn einasta dag.

- Tí er hetta ein skilagóð íløga, legði hon afturat.

# Hetta kunnu vit ikki finna okkum í

**Samgongan revsar tær kommunur, sum føra ein varnan fíggjarpolitikk, sigur borgarstjórin í Hvalba**

MISMUNUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hesum kunnu vit ikki finna okkum í.

Otto West, borgarstjóri í Hvalba, er í øðini inn á samgonguna í Løgtinginum.

Nú fíggjarlógin fyri næsta ár er samtykt, hevur Skálavíkar Kommuna fingið eina millión krónur til at bøta um brimskaðan, sum grótkastið á havnarlagnum fekk í eini ódn síðsta vetur.

Í Hvalba fekk grótkastið á havnarlagnum eisini heilt stóran skaða, men Hvalbiar Kommuna fekk ikki eitt oyra í stuðuli úr landskassanum til at bøta um skaðan.

- Tað kom dátt við, ásannar borgarstjórin í Hvalba.

- Vit kunnu ikki finna okkum í, at landið ger so stóran mismun á tveimum kommunum, sigur Otto West, borgarstjóri.

Hann sigur, at skaðin á grótkastið í Hvalba var fleiri ferðir so stórur, sum skaðin í Skálavík, men kortini fáa hvalbingar ikki eitt klovið oyra.

- Tað sær av álvara út til, at landsins myndugleikar revsar tær kommunur, sum føra ein varnan fíggjarpolitikk, sigur hann.

- Tað sær út til, at bara tí, at vit hava ført ein varnan fíggjarpolitikk og hava lagt pening til síðis, skulu vit onki fáa.

Borgarstjórin í Hvalba heldur, at hetta er sanniliga ikki serliga eggjandi og slíkari framferð kunnu tey ikki finna okkum í, heldur hann.

Tí ivast hann ikki í, at Hvalbiar Kommuna fer at taka málið upp aftur

Arbeitt hevur verið í alt summar at gera grótkastið aftur og tað er eitt arbeiðið, sum kostar Hvalbiar kommunu átta milliónir, umframt mvg.

Men so nógv hevur kommunan ikki ráð at fíggja ísenn og tískil verður útreiðslan goldin upp á trý ár og tað førir ein eykakostnað við sær, so tilsamans kostar brimskaðin í Hvalba kommununi 11 milliónir.



*Otto West, borgarstjóri í Hvalba, ásannar, at tað kom dátt við, at meirilutin í Løgtinginum skal fáa seg til at gera so stóran mun á tveimum kommunum, ið eru komnar í somu støðu*